## DAGSINS MEINING

# Spennandi fólkatingsval - val millum samgongu og andstøðu!

Á miðdegi ígjár skrivaði forsætisráðharrin út fólkatingsval. Val til nýtt fólkating verður tann 20. november, ella sama dag sum kommunual verður í Danmark. Hetta merkir, at um tríggjar vikur skulu føroyingar avgera, hvør skal umboða okkum á danatingi.

Men valið er eisini ein ábending um politiska rákið í Føroyum: hvørja undirtøku fáa landsstýrisflokkarnir og hvørja undirtøku fáa andstøðuflokkarnir. Tí frá udnanfarnu valum vita vit, at tað eru dagsins mál í Føroyum sum verða sett á dagsskránna í valstríðnum til fólkatingsval.

Hetta merkir, at tað verður fullveldismálið og vantandi sosialpolitikkurin hjá landsstýrinum, sum óivað verða hvuðsevnini í valstríðnum í Føroyum. Og so verður tað sjálvandi afturvendandi spurningurin, um vit skulu hava umboðan á fólkatingi ella ikki.

Men avgerandi fyri dagsskránni í valstríðnum er sjálvandi, at Tjóðveldisflokkurin og formaður flokksins stilla upp. Tjóðveldisflokkurin stillaði upprunaliga ikki upp, tí talan var um eitt danskt val, og fekk flokkurin umboðan gav hann seg undir donsku grundlógina. Tó hevur flokkurin stilla upp siðani 1973 og hann hevur havt umboðan okkurt skeiði.

Sambært seinastu meiningarkanningunum fær Tjóðveldisflokkurin bestu og næstbestu undirtøkuna. Hann kann tí verða vissur í at fáa mann valdan, hóast nógv tjóðveldisfólk slettis ikki fara á fólkatingsval.

Frammanundan hevur Fólkaflokkurin umboðan. So er spurningurin, um vánaliga undirtøkan í seinastu veljarakanningunum hjá Fólkaflokkinum eisini smittar á fólkatingsvalið ella ikki.

Men í øllum førum eiga hesir møguleikar at siga okkum, at vilja føroyingar hava, at føroyska umboðan ikki bara liggur hjá flokkum, sum vilja fullveldi ella loysa, so eiga samríkisfólk at flokkast um tann flokk ella valevni, sum hevur besta møguleikan at at verða vald.

Í hesum sambandi er eisini spurningurin, um Sjálvstyrisflokkurin stillar upp. Stillar hann ikki upp, fella at atkvøður óivað báðar vegir, og tær atkvøðurnar kunu verða rættiliga avgerðandi. Men óivað stillar hann upp, tí hann hevur tørv at markera seg, tí eftir meiningarkanningunum hevur hann
minkandi undirtøku.

Ti verður valið spennandi - helst tað mest spennandi í mong ár.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Samgongan hóttir vælferðarsamfelagið

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



**Góða fíggjargongdin seinastu árini gevur okkum møguleikar at fáa mong tiltrongd viðurskiftir í rættlag. Men framburðurin verður nú hóttur av samgonguni, sum ístaðin fyri at gera tiltrongdar ábøtur her á landi, gevur 400 milliónir krónur til danir komandi ár. Vandi er fyri halli á fíggjarlógini komandi ár.**

Allar staðir í samfelagi okkara eru stórar almennar uppgávur at loysa. Vit fingu ikki loyst mangar av hesum uppgávum orsaka av kreppuni. Men nú kunnu vit. Hesar uppgávur krevja, allar sum ein, stórar upphæddir til íløgur umframt rakstur (t.d. neyðug útbygging av ellis og røktarheimsøkinum).

Tað sæst á heilsuverki okkara, at tað hevur mist unleið 1 milliard krónur, síðan kreppan setti inn. Bert til viðlíkahald av verandi bygningum innan sjúkrahúsverkið krevjast 500 - 600 milliónir komandi 10 árini.

Somuleiðis skulu stórar upphæddir til innan samferðslukervi okkara. T.d. nýggj Suðuroyarferja (300 milliónir) eins og Leirvíkstunnil (350 millionir).

Innan skúlaverkið skulu eisini nýtast hundratals milliónir krónur komandi árini til víðlíkahald, nýbygging og rakstur.

Pensiónirnar eru afturútsigldar, og eiga at hækkast.

Innan stóra økið hjá Meginfelag teirra Brekaðu í Føroyum (MBF) skal nógv gerast, tí á nærum øllum økjum teirra eru viðurskiftini ikki nøktandi. O.m.a.

Innan øll omanfyrinevndu økir er tørvurin kannaður og ávístur.

"Bert" skal peningur til á fíggjarlógini fyri at fáa viðurskiftini gjørd. Tað vil siga, at politiski viljin tørvar. Tí á hesum økjum er politiski viljin tað sama sum ein upphædd á fíggjarlógini.

Talan er um pening - í fleiri førum - til íløgur og síðan víðlíkahald og rakstur hvørt einasta ár framyvir.

Júst hesi viðurskiftir kunnu vit fáa framt nú, tí fíggjarligi møguleiki er til staðar. Men frá 1.jan roynir loysingarsamgongan at skerja hendan møguleika. Teir vilja heldur nýta hendan pening til loysing.

**Danir ynskja helst Kallsberg og Hoydal eftir komandi val:**

Men ístaðin fyri at loysa uppløgdu uppgávurnar her á landi, so fáa danir nú umleið 400 milliónir krónur fleiri frá loysingarsamgonguni at loysa sínar egnu uppgávur í Danmark. Vit kunnu tí siga, at danir hava gjørt kvetti av at hava Høgna Hoydal og Kallsberg "stýrandi" í Føroyum. Hesir, ið ofra vælferð føroyinga fyri loysingina. Helst ynskja danir at síggja hesar í samgongu eftir eitt komandi val. Danir gera nevniliga kvettið, ímeðan økir her á landið liggja í skeljasor. Tað er púra greitt, at teir tæna ikki Føroyum, sum teir arbeiða. Um stutta tíð ætla teir so at selja arvasilvurið, so føroyingar av álvara koma at gerast trælir í egnum húsi, sveittandi, fyri at avkastið í útlendskum partafeløgum verður so stórt sum møguligt.

Núverandi samgonga royndist okkum sera illa. Tað er vist. Teir hava nevniliga víst, at teir ikki hava nakran vilja at bøta um vælferðartænastur føroyinga. Tann peningur, ið skuldi nýtast til tað, verður settur í Landsbankan, har vit síggja eitt falskt yvirskot.

**Vónandi verða hesir útskiftir eftir eitt komandi val**

Eg vóni, at hendan skaðiliga samgongan eftir eitt komandi val fær durafjórðingin, og at ein komandi samgonga fær ríkisveitingina uppá pláss aftur, so neyðug útbygging verður av økjum her á landi, sum ídag liggja í órøkt.

Vit sambandsfólk eru góð við Føroyar. Og íbúgvar tess. Vit slakta ikki vælferðarsamfelagið fyri eina loysing.

Nógvar staðir í landi okkara er neyð - orsaka av ynski samgongunar at vísa fram eitt ovurstórt yvirskot, heldur enn at loysa tiltrongdar uppgávur. Tað má broytast nú.

# Dagstovnaøkið brúkt sum jarnbrot fyri at kroysta kommunurnar at samarbeiða

**Føroya Pedagogfelag**

Løgmaður førir fram í grein í Dimmu 5. okt. 2001, at álit, sum nágreiniliga greinar sundur kommunumál og landsmál, er um at vera liðugt, og at tað síðan skal raðfestast hvussu málsøki verða flutt út til kommunurnar.

Nær fyrstu málsøkini verða útløgd, vil løgmaður tó iki siga nakað neyvt um.

Løgmaður sigur víðari, at tað er av stórum týdningi at kommunurnar fáa góða tíð at fyrireika seg og byggja upp neyðugu umsitingaramboðini.

Løgmaður sigur eisini í greinini, at avgerandi fyri at eitt málsøki fær eina góða byrjan, er, at kommunurnar eru klárar og væl fyrireikaðar, tá vandi annars er fyri bakkasti og fyri at projektið ikki fer at eydnast.

Hóast hesi føgru og skilagóðu orð, avgjørdi løgmaður saman við samgonguni longu seinasta ár at leggja dagstovnaøkið út til kommunurnar uttan nakra fyrireiking yvirhøvur.

Hóast dagstovnalógin varð samtykt at kom aí gildi 1. juli seinasta ár, vaknaði onkur í Fíggjarmálastýrinum ikki fyrrenn í februar mánaða í ár við kaldan dreym, aftaná at felagið hevði verið til 1. samráðingarfund við Fíggjarmálastýrið fyri alt dagstovnaøkið.

Kommunurnar fóru tá í skundi undir at samskipa seg og boðaðu felagnum frá, at tær ikki vóru klárar til samráðingar fyrr enn í mai mánaða.

Felagið kann bert staðfesta, at samgongan ikki hevur fylgt hesi uppskriftini hjá løgmanni, tá dagstovnaøkið varð lagt út, men tvørturímóti víst stórt ábyrgdarloysi og líkasælu fyri dagstovnunum.

Hóast sáttmálin fyri alt dagstovnaøkið fór úr gildi 1. mars er enn eingin nýggjur sáttmáli komin undir land. Hvørki landsella kommunalpolitikkararnir hava víst seg undir samráðingunum ella víst nakran vilja yvirhøvur at fáa sáttmála við felagið.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# Alla halganna dagur

»Eg eri uppreisnin og lívið; tann, sum trýr á meg, skal liva, um hann so doyr; og hvør tann, sum livir og trýr á meg, skal aldri um ævir doyggja; trýrt tú hesum?« Johs. 11, 25-26.

Tað eru mong, sum í hesum døgum sita og gráta sáran um ein ella fleiri av sínum elskaðu, sum deyðin á ein ella annan hátt hevur tikið í sín kalda favn, saknurin er so ómetaliga stórur, alt er so tómt og vónleyst, tá ein av okkara verður tikin frá okkum, vit duga so illa at taka tað at deyðin hevur gjørt innrás í heim okkara, og hevur slitið tey eymastu bond, sum knýttu okkum saman her í lívinum.

Hesi orðini, sum omanfyri standa, eiga vit at leggja okkum í geyma, tí tað er Jesus sjálvur, sum sigur tey við Martu eftir tað at bróðir hennara var deyður; tað sum Jesus sigur er altíð álítandi. Tað er øðrvísi við okkum, vit kunnu siga eitt í dag og so nakað heilt annað í morgin. Lati hesi orðini verða tykkara stóra troyst, sum mist hava, tey kunnu bera tykkum uppi í døgunum, sum liggja fyri framman.

Øll tey ríku minnini, vit eiga eftir tey, vit hava mist, eru dýrabar, ja, so dýrabar, at tey eru ljósglottar á vegi okkara yvir lívsins hav, til vit einaferð sjálv leggja árarnar inn. Gud gevi at vit ein dag standa frí og frelst heima í Himli, og tað gera vit, um vit líta á tað, sum Jesus hevur gjørt fyri okkum við sínum deyða á Golgata krossi og uppreisn páskamorgun. Tað gevst eingin onnur atgongd til ævigt lív, enn tað sum Jesus hevur gjørt fyri okkum; líta vit á tað, so koma vit á mál, og hetta er eisini besta troyst, sum Jesus ikki bert bjóðar Martu, men eisini vil bjóða øllum tykkum, sum í dag sita niðurtyngd av sorg og sakni.

Eftir hetta sá eg, og sí, stórur skari, sum eingin var førur at telja, av øllum fólkasløgum og ættum og tjóðum og tungumálum; teir stóðu frammi fyri hásætinum og frammi fyri lambinum, skrýddir í longum hvítum klæðum, og høvdu pálmagreinar í hondunum; og teir rópaðu við harðari reyst og søgdu: »Frelsan hoyrir Gudi várum til, sum í hásætinum situr, og lambinum«. Og allir einglarnir stóðu rundan um hásætið og hinar elstu og hinar fýra verurnar, og teir fullu niður fyri hásætinum á andlit síni og tilbóðu Gud og søgdu: »Amen! Signingin og dýrdin og vísdómurin og takkargerðin og heiðurin og mátturin og kraftin veri Gudi várum um aldur og allar ævir! Amen«. Og ein av hinum elstu tók til orða og segði við meg: »Hesir, sum skrýddir eru í teimum longu, hvítu klæðunum, hvørjir eru teir, og hvaðan eru teir komnir?« Og eg segði við hann: »Harri mín, tú veitst tað«. Og hann segði við meg: »Hetta eru teir, sum komnir eru úr trongdini miklu, og hava tvigið klæði síni og gjørt tey hvít í blóði lambsins. Tess vegna eru teir frammi fyri hásæti Guds og tæna honum dag og nátt í templi hansara; og tann, sum í hásætinum situr, skal tjaldra yvir teir. Ikki skulu teir longur hungra, og ikki skulu teir heldur longur tysta, og ikki skal heldur sól brenna teir, ikki heldur nakar hiti; tí at lambið, sum er fyri miðjum hásætinum, skal røkta teir og leiða teir til lívsins vatnkeldur, og Gud skal turka hvørt tár av eygum teirra«. Op. 7, 9-17.

Hetta er tað lyfti, sum ein og hvør eigur sum lítur á tað, ið Gud hevur givið menniskjum til frelsu, nevniliga Jesus Kristus. Gud troysti tykkum øll, sum mist hava; friður veri við minninum um tey, sum farin eru. Guds friður veri við okkum øllum. So vil eg enda við einum Alla halganna sálmi, sum eg havi yrkt til Alla halganna dag 2001.

## Alla halganna sálmur

*Lag: Nú hvítna tindar fjøllum á. Bf. 261.*

Alvaldi Gud hann gevur her,
í síni ríku náði;
alt tað oss tørvar her í verð,
lov, tøkk og prís hann fái.

Várt lív á fold ein byrjan er,
til ævigt í Guds ríki;
og tað er Jesu sáttargerð,
hon aldri frá oss víki.

Ein frelstur skari himni á,
nú prísar Gudi góða;
at hann tey frelsti syndum frá,
frá teimum tøkk man ljóða.

Tey eru har Guds einglum lík,
og syngja øll av hjarta;
nei, aldri fanst ein gáva slík,
sum náði Guds hin bjarta.

Gud gevi okkum heim at ná,
við Jesu offurdeyða;
so okkar’ kæru vit har sjá,
oss tváar blóðið reyða.

Ein dag so fara vit úr verð,
her slær ei meir várt hjarta;
tá verjir oss Guds sáttargerð,
og náðarsólin bjarta.

**Kjartan Stakksund**

# Væleydnaður Fróðarfundur í Norðurlandahúsinum

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Fróðkaparfelag*



Leygardagin 27. oktober hittust einir áttati granskarar og grannskingaráhugað fólk til Fróðarfundin - ella Fróðardagin - ið Føroya Fróðskaparfelag hevði skipað fyri í samstarvi við Norðurlandahúsið við eini skrá, ið fevndi um seks tímar.

Hetta er fyrstu ferð, felagið roynir eitt tiltak av hesum slag, har tað stendur granskarum innan allar frøðigreinir, limum og ikkilimum, umframt granskingaráhugaðum yvirhøvur, í boði at koma saman at skifta orð um granskingarspurningar sum heild, menning av verandi granskingarvirksemi og framtíðar granskingarætlanir. Hvørja leið eigur framtíðar gransking í Føroyum at taka? Og hvat er neyðugt til tess at bøta um og fremja tvørfakliga samstarvið?

Inngangurin til fundin var ein fyrilestur um, hvat tað í grundini er at granska. Felagið hevði sum íblástur uttaneftir boðið kenda og sera umhildna fyrilestrahaldaranum Bjørn Berland, professarara frá Universitetet i Bergen, higar at greiða frá hesum. Tað gjørdi hann við vælvaldum orðum og áhugaverdum dømum.

Eftir fyrilesturin býttu luttakararnir seg í sjey bólkar fyri ávikavist fyri málfrøði, bókmentafrøði, søgu/siðsøgu, náttúruvísindi/lívfrøði, fiskivinnu/matframleiðslu, samfelagsfrøði, heilsufrøði. Uppgáva teirra var hvør á sínum lagi at viðgera og lýsa nærri spurningarnar, fundurin legði upp til - til framløgu og felags orðaskifti seinni á degnum.

Felags orðaskiftið staðfesti, at tað er ikki so lítið av gransking, sum fer fram í Føroyum, men harfyri er almikið, sum liggur á láni og uppiber betri umstøður. Í granskingarhøpi hava Føroyar nógv at bjóða, granskingarevnini tróta ikki, føroyski granskarahópurin er í vøkstri, og áhugin fyri gransking er stórur millum útbúnar føroyingar, bæði her á landi og úti í heimi. Eisini mega vit fáa útlendskar granskarar hendanvegin til tess at geva íblástur og til tess at vaksa um granskingarumhvørvið. Víst varð á, at samstarvið millum tey ymisku granskingarøkini í Føroyum eigur at økjast munandi.

Nevnt varð, at eitt felag sum Føroya Fróðskaparfelag við sínum skjótt fimti árum á baki og sínum mongu limum innan allar frøðigreinir hevur møguleika fram um einstaklingar at taka munagóð stig føroyskari gransking til frama. Í hesum hæpi heittu fundarluttakararnir á felagið um at gera framda gransking meira sjónliga og atkomuliga fyri almenninginum. At felagið virkar fyri tvørfakligum samstarvi varð hildið sjálvsagt. Ymist annað kom fram í orðaskiftinum, eitt nú eitt ynski um, at felagið átók sær ein virknan leiklut í at vísa á, hvat krevst, til at gransking í Føroyuum fær tey kor, henni tørvar til at trívast og mennast. Gransking skal geva eitt íkast til stóra vísindaheimin. Men samstundis er tað ein sannroynd, at gransking - av hvørjum slag hon enn er - er ein íløga í framtíðina, sum sæst aftur í samfelagsligum framburði.

Formaður felagsins, Dánjal Petur Højgaard, endaði fundin við einum samandrátti av tí, ið fram var komið í bólkunum, sum viðmerkingar, uppskot og hugskot, og í orðaskiftinum aftaná, takkaði fyri tann stóra áhugan fyri tiltakinum og væl útint arbeiði. So skjótt sum tilfarið er savnað saman, vil nevndin í felagnum taka tað til gjølliga umhugsan og viðgerð.

Ein væleydnaður fundur var at enda komin. Fleiri av luttakarunum høvdu á orði, at tiltak sum hetta átti at verða uppafturtikið, til dømis eina ferð um árið eins og ein stevna millum aðrar her á landi.